



# MÁL OG MIÐ

## ALMENN FYRIBYRGING Í **SSP**

## 2015 – 2016

SSP | Skúli Sosialir myndugleikar Politi



> Umframt heimið, er skúlin týdningarmesta staðið at menna og styrkja børn og ung til at verða sjálvstøðugir brúkarir á netinum

# TALGILDI HEIMURIN

Talgildi heimurin er sum veðrið. Øll tosa um tað, men eingin ger nakað vit tað – ella...? Á vári 2015 kom út frágreiðing um happing í fólkaskúlanum. Spurt var millum annað um happing á sosialu miðlunum. 164, ella 2% av næmingunum, svaraðu, at teir hava upplivað hetta viðhvørt. Um hetta tal er stórt ella lítið veldst um, hvat eygað sær. Undir øllum umstøðum skulu vit ikki góðtaka slíkan atburð – punktum. Í frágreiðingini verður víst á, at SSP arbeiðir miðvíst við átakinum ”Tryggari á netinum” og at tað kann hugsast, at tað arbeiðið hevur gjørt sítt til, at talið á teimum, sum eru fyri happing í sosialu miðlunum, tykist lægri í Føroyum enn í okkara grannalondum.

Hetta er tekin um, at vit eru á rættari leið. Eg hoyri tó ofta um hendingar, har tey ungu – og vaksin fyri tann skuld – ikki duga sær hógv. Myndir og tekstir fara flúgvandi gjøgnum luftina. Hetta er í sjálvum sær einki forgjørt í. Men tá ið persónligar myndir verða sendar víðari til ein triðja persón, so er talan um lógarbrot. Og tá ið ein skúli verður partur av eini hending – við til dømis myndum av naknum næmingum – er hetta ein ring støða fyri tann ella tey, myndin er av. Tá er trupult at vera í skúla.

Skúlin og vit, sum eru um børnini og tey ungu í kunningarsamfelagnum, mugu vera um tey á meira enn ein hátt. Spurningar um ábyrgd, upphavsrættindi og rætt til privatlív stinga seg upp ferð eftir ferð. Og ikki minst vaksandi tvístøðan, sum vit koma í, tá vit eru ov nógv á netinum og gloyma nærveruna.

Eisini mugu vit hava í geyma, at vitan og hugburður fremur atburð. Kanningar vísa, at heilin mennist, tá ein er saman við øðrum menniskjum. Samstundis mugu vit staðfesta, at børn og ung í dagsins samfelagi fyri ein stóran part sita einsamøll framman fyri skíggjan. Henda tíðin verður tikin frá øðrum týdningarmiklum løtum, eins og ovurnýtslan ávirkar andligu evnini at læra.

Vit fáa ikki gjørt so nógv við veðrið. Men vit mugu gera tað, vit kunnu, at læra okkara børn um teir møguleikar og vandar, ið eru á leiðini, so tey kunnu ferðast trygt á netinum. Umframt at foreldrini eiga sín lut, er SSP samstarvið pallurin til at samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið. Vit halda áfram við, at lærarar og næmingar í 4. flokki viðgera evnið ”Tryggari á netinum” og at foreldrini eru ein virkin partur í hesum. Politiið hevur umskipað tilboðini um kriminalitetsfyribyrgjandi undirvísing. Frá skúlaárinum 2015/16 verður ”Etikkur á netinum” eitt tilboð til næmingar í 6. flokki.

Umframt heimið, er skúlin týdningarmesta staðið at menna og styrkja børn og ung til at verða sjálvstøðugir brúkarir á netinum. SSP ráðgevingin hevur, saman við fleiri stovnum og felagsskapum, tikið stig til at geva út arbeiðsheftið ”Talgilt samskifti í skúlanum”. Endamálið við heftinum er at hjálpa skúlanum í gongd við eitt samskifti um talgildan trivnað og virði skúlans í sambandi við netnýtsluna hjá børnum og vaksnum. Sum frá líður eigur miðvísi arbeiðshátturin at skapa bestu fortreytir fyri, at børn og vaksin kenna sínar skyldur og ábyrgd, tá ið ferðast verður á netinum.

*Óli Rubeksen, SSP ráðgevi*

# TALGILT SAMSKIFTI Í SKÚLANUM

Endamálið við hesum heftinum er at hjálpa tykkara skúla í gongd við eitt samskifti um talgildan trivnað og virðir skúlans í sambandi við netmiðlanýtsluna hjá børnum og vaksnum. Í heftinum eru nøkur tvístøðukort, sum kunnu vera grundarlag undir arbeiðnum í ymisku eindunum í skúlanum: leiðslutoymi, skúlastýri, starvsfólk, næmingar og foreldur.

Í heftinum eru uppskot til arbeiðshættir, so bæði leiðsla, skúlastýri, foreldur, næmingar og lærararvið kunnu vera við í tilgongdini, og samskiftið soleiðis gongur millum hesar bólkar. Meira tilfar er at finna á netinum á www.digitaldialog.dk.




## MÁLBÓLKUR

Heftið vendir sær fyrst og fremst til skúlaleiðarar, skúlastýrir, lærarar og starvsfólk, sum halda, at tað er tørvur á at seta evnið á dagsskránna. Tilfarið kann eisini nýtast í øðrum høpi t.d. í frítíðarstovnum.

FØROYA LÆRARAFELAG · FØROYA TELE · Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI · SSP · NÁM · barnabati

# FORELDRINI
## ERU BESTA FYRIBYRGINGIN

og tí vil SSP stuðla undir tykkara leiklut
fyri trivnaðin og sosiala lívinum hjá tínum barni.



### FYRIBYRGING

snýr seg um at hava
tað góða í lívinum í fokus
og hava vit hesi tilboð í skúlanum:

SPÆLIBÓLKAR
frá skúlabyrjan

KNÝTA BOND
millum foreldrini

TRYGGARI Á NETINUM
í 4. flokkunum

UNG OG LÍVIÐ
í 7-8. flokkunum



### POLITIIÐ

bjóðar hesa undirvísning:

1. FLOKKUR
ferðsluundirvísing

6. FLOKKUR
etikkur á netinum

9. FLOKKUR
harðskapur + revsiváttan

SSP
Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

# SSP ÁLMANAKKI

# SKÚLAÁRIÐ 2015 – 2016

| EVNI: | MÁLBÓLKUR: | TÍÐARSKEIÐ: | LITUR: |
|---|---|---|---|
| Knýta sambond millum foreldrini | Øll foreldur | Alt árið | |
| Spælibólkar | Frá skúlabyrjan | Alt árið | |
| Tryggari á netinum | 4. flokkar | 26. oktober 2015 - 2. februar 2016 | |
| Ungur og lívið | 7. flokkar | 23. - 27. februar 2016 | |
| Ungur og lívið | 8. flokkar | Alt árið | |
| Trivnaðarkanning | 7-8. flokkar | Februar - mai 2016 | |
| Kveikingardagur | | 6. november 2015 | |

**POLITI BJÓÐAR UNDIRVÍSING**

| | | |
|---|---|---|
| Ferðsluundirvísing | 1. flokkur | Alt árið |
| Etikkur á netinum | 6. flokkur | Alt árið |
| Harðskapur + revsiváttan | 9. flokkur | Alt árið |



# KNÝTA BOND
## MILLUM FORELDRINI

Royndir vísa, at foreldrini er tann besta fyribyrgjandi eindin. Hetta vil SSP menna við miðvísum foreldraarbeiði í samstarvi við skúlastýri, leiðslu og flokslærarar.

Foreldranetverk er, tá ið foreldur í einum flokki hittast og skifta orð um áskoðanir, rammur og hugskot. Endamálið er at hjálpa foreldrum at tosa saman om týdningamiklar spurningar í gerandisdegnum hjá børnum og ungum.

**Hví skulu vit hava foreldranetverk?:**

- Innlit í støðuna hjá børnunum hjá hvør øðrum fremur trivnað.
- Fyribyrgja ósemjur, arging og happing.
- Felags rammur fyri veitslur, rúsdrekka, nær barnið skal verða inni o.l. stuðlar foreldrum sum uppalarar.
- Lættari at loysa trupulleikar, tá ið foreldrini kenna hvønn annan og hava avtalað, at tosa saman, um ein er í iva.
- At fyribyrgja misskiljingar, frustratión og óvissu í uppalingini.

Mælt verður til at skipa foreldranetverk frá skúlabyrjan.


FORELDRAFUNDUR Í FYRSTA

Endamál

Knýta bond

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

Foreldrini best

Fyribyrging snýr seg um at hava tað góða í lívinum í fokus, og royndir vísa, at foreldrini eru tann besta fyribyrgjandi eindin.

*

Hesir fundir verða hildnir kring alt landið, og endmálið er at hjálpa foreldrum at tosa saman um týdningarmiklar spurningar í gerandisdegnum hjá børnum og ungum.

*

Upplegg við Óla Rubeksen
SSP ráðgeva

*

Fyri at fáa innlit í støðuna hjá næmingunum, hittir Óli teir til eitt prát og orðaskifti fyrr um dagin.

Foreldrafundurin har barnið og foreldrini eru í miðdeplinum

Foreldranetverk er, tá ið foreldur í einum flokki hittast og skifta orð um áskoðarnir, rammur og hugskot fyri trivnaðin og sosiala lívið í flokkinum. Miðvíst arbeiði við trivnaðinum er eisini við til at forða fyri órógv og happing millum næmingarnar.

Boða frá luttøku

Fundurin
Mánadagin
9. mars 2015
kl. 19:00
Trongisvágs skúla

Evsta mark
Boðað flokslæranum frá innan fríggjadagin 6. mars 2015

Gev gætur
Tað er umráðandi, at barnið verður umboðað og vilja vit fegin, at bæði foreldrini luttaka.



# SPÆLIBÓLKAR

Fyribyrging er lyklaorðið í arbeiðinum við góðum sosialum trivnaði. Miðvíst arbeiði við trivnaðinum er eisini við til at forða fyri happing og órógv millum næmingarnar.

Spælibólkar er eitt umhvørvi, har øll hava møguleika at verða sædd og hoyrd og koma til orðanna og er ein sera góður máti at arbeiða við trivnaði. Allir limirnir í bólkinum sleppa at vísa sítt virði í tryggum heimligum umhvørvi, ið foreldrini vara av. Samumtikið snýr tað seg um at styrkja sosiala kapitalin í einstaka flokkinum.

Mælt verður til at skipa spælibólkar frá skúlabyrjan.






# TRYGGARI Á NETINUM



**Elektroniskir samskiftismiðlar eru ein partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum. Fartelefonin og internetið eru komin fyri at verða, og tú kanst eins væl taka í hondina á barninum og leiða tað gjøgnum vandarnar á netinum.**

Fyri at fyrbyrgja kriminaliteti við elektroniskum miðlum, er neyðugt við miðvísari undirvísing og átøkum, soleiðis bæði næmingar og foreldur fáa innlit og eru tilvitaði um at taka tey røttu valini.

Evnið er elektroniskt samskifti hjá børnum, og endamálið er at læra tey at ferðast tryggari á internetinum, læra tey at verja sínar upplýsingar og sítt privatlív og annars, hvar markið er fyri, hvat er loyvt og ikki loyvt at gera á netinum.

**4. FLOKKUR**

Sum upptakt til altjóða trygga internetdagin 3. feburar 2015, verður mælt til, at evnið verður viðgjørt saman við næmingarnar í 4. flokki. Átakið skal somuleiðis venda sær til foreldrini.

**Undirvísingartilfar:**

„TAÐ ER TÍN AVGERÐ 2“
„SAMSPÆLIÐ“
„SOSIALA LÍVIÐ HJÁ BARNI TÍNUM Á NETINUM OG FARTELEFON“
„VEIST TÚ HVAT BARNIÐ GER Á NETINUM?“

# UNG OG LÍVIÐ

Í fyribyrgjandi arbeiðinum skal arbeiðast miðvíst við at fremja hugburðin um tað góða lívið. At ein og hvør hevur ábyrgd fyri egnum gerðum. Ein týðandi táttur er fatanin av sosiala lívinum og upplivingar, sum javnaldrarnir halda vera rættar.

M.a. verður arbeitt við ábyrgdini at velja eitt virkið ungsdómslív uttan rúsdrekka, avbjóðingar í talgilda heiminum, vinarlag og venjingum sum aktivera næmingarnar og leggja upp til orðaskifti um hugburð og atburð.



**7. FLOKKUR**
Mælt verður til miðvísa frálæru í 7. flokkunum. Átakið skal somuleiðis venda sær til foreldrini og teirra leiklut sum uppalarar.

**8. FLOKKUR**
Mælt verður til at halda fast við ta tilgongd, ið byrja varð í 7. flokki viðvíkjandi rúsdrekka.

**Undirvísingartilfar:**
„PRÁT UM RÚSDREKKA"
„FORELDRAFUNDIR KUNNU MINKA UM DRYKKJUSKAPIN HJÁ UNGUM"
„SAMSPÆLIÐ"
„LION'S QUEST"

# SPÆLILIÐIÐ

## – meira rørsla, betri trivnaður

**AKT og SSP hava eitt felags endamál, sum er at arbeiða við átøkum fyri at fáa næmingarnar at trívast.**




Endamálið við Spæliliðnum er at fáa næmingar at røra seg meir og verða kropsliga virknar. Dentur verður lagdur á at fáa teir yngru næmingarnar at spæla í skúlagarðinum í fríkorterunum.

Ein partur í uppgávuni hjá Spæliliðnum er eisini at bøta um trivnaðin. Spæliliðið er á henda hátt við til at skapa lív í skúlagarðinum – bæði kropsliga og sosialt.

Næmingar úr 7. flokki skipa fyri. Hesir næmingar hava verið á skeiði, har teir venja hvussu teir kunnu standa fyri uppgávuni. Fyri at tryggja at tey ungu í spæliliðnum hava ábyrgdarfólk at venda sær til, er ein lærari akkersfólk hjá Spæliliðnum.

Rørsla

Trivnaður

Akkersfólk

# TRIVNAÐAR-KANNING

Ein týðandi táttur hjá ráðgevingini er at savna hagtøl og skjalfesta vitan. Higartil fevnir kanningin um vanarnar hjá teimum ungu í sambandi við royking, rúsdrekka og at verða ungur í Føroyum. Skipanin er gjørd eftir norðurlenskum leisti. Hon er einføld, og tað er ómakaleyst at seta fleiri spurningar inn, um tørvur er á hesum. Tá ið kanningin var gjørd í 2013, var hon víkað, so innlit m.a. fæst um hvussu tey ungu handfara sosialu miðlarnar.

**7. – 8. FLOKKUR**





# 7. KVEIKINGAR-DAGURIN

## fríggjadagin 6. november 2015 kl. 9-16 í Norðurlandahúsinum

Ein kveikjandi dagur at stimbra tvørprofesion-ella samstarvið í SSP, at login áhaldandi brennur fyri rættindinum hjá børnum og ungum til eitt virðuligt lív.



## DAGURIN:

**„Barnaumboðsmaðurin – BUM.FO“**
Sólja í Ólavsstovu, løgtingsins umboðsmaður

**„Happing sum fyribrigdi – tvær paradigmur“**
Katrin av Kák, námslektari í sernámsfrøði

**„Royndarverkætlanin TÍTT – tiltøk í tøkum tíma“**
Óli Rubeksen, SSP ráðgevi

**„Hvussu taka vit ímótið teimum nýggju útlensku føroyingunum“**

**„Vágið og marginalisering av børnum í vitanarsamfelagnum“**
Ivar Frønæs, dr. philos Olso Universitet

**„Foreldur og teirra ávirkan á felagslívið, trivnaðin og skúlagongdina hjá børnunum“**
Jens Andersen, psykologur og rithøvundur

SSP
Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

# POLITI

## BJÓÐAR UNDIRVÍSING

**MANNAGONGDIN:**

1 Flokslærarin og SSP lærarin velja og samskipa tiltøkini á skúlanum

2 SSP lærarin ger avtalur við SSP politistin um undirvísing

**SKRÁIN:**

**1. FLOKKUR**
– ferðsluundirvísing

**6. FLOKKUR**
– etikkur á netinum

**9. FLOKKUR**
– harðskapur + revsiváttan

Nærri kunning og avtalur um undirvísingina fæst við at venda sær til SSP politistin í økinum ella á ssp@politi.fo

**SSP POLITISTAR**

| | |
|---|---|
| Tórshavn og har á leið: | Mariann Reinert, tel. 284812 |
| Norðoyggjar og Eysturoy: | Sigmund Petersen, tel. 790204 |
| Norðoyggjar og Eysturoy: | Linda Jacobsen, tel. 790201 |
| Vágar og Norðurstreymoy: | Michael Gram, tel. 790203 |
| Sandoy: | Rosa Mortensen, tel. 790202 |
| Suðuroy: | Lars Müller, tel. 790205 |



# KRIMINALFYRIBYRGJANDI UNDIRVÍSING

**ENDAMÁL:**

- At tryggja at næmingurin skilir grundarlagið fyri at hava lógir og viðtøkur.
- At eggja næminginum til at fylgja og liva eftir hesum.
- At stuðla næminginum til at vera føran fyri sjálvstøðugt og ábyrgdarfult at velja eitt gott lív, bæði hvør sær og samfelagsliga.
- At næmingurin kennir møguleikarnar fyri revsingum og øðrum rættarligum fylgjum í sambandi við eitt lógarbrot – undir hesum, møguleikanum fyri endurgjaldskravi, og blett á revsiváttinina.

**HUGBURÐUR OG FATAN:**

- At fáa næmingin at skilja og viðurkenna teir kensluligu, viðkvæmu, sosialu og persónligu trupulleikarnar, sum eru orsøk til, at menniskju fremja lógarbrot.
- At fáa næmingin at viðurkenna, at tað er óhugaligt at vera útsettur fyri einum lógarbroti.
- At fáa næmingin at taka støðu til øll tey val, sum verður borðreitt fyri honum dagliga.

**ÁSETINGAR:**

- Undirvísingartímarnir skulu fyrireikast og fremjast soleiðis, at teir innihalda ein faktuellan part og ein hugburðsvirkandi part. Í faktuella partinum verður upplýst um rein fakta, meðan tað í tí hugburðsvirkandi partinum verður lagt upp til kjak um evnið, sum undirvísingin snýr seg um. Endamálið við kjakinum er, at vekja áhugan hjá næminginum um evnið.



tR. C. Effersøesgøta 30
100 Tórshavn
Tel: +298 30 24 95
Fax: +298 30 24 96
www.bvs.fo

# MINNIST TÚ HINAFERÐ...

Okkara minnir frá barnárunum fylgja okkum alt lívið, og minnini frá góðum løtum við familjuni leggja trygga botnin at byggja lívið á. Tí er tað so týdningarmikið, at vit taka okkum stundir at skapa góð minnir saman sum familja.

Eitt gott minni kann vera so nógv. Ofta er talan um lítlar løtur, ið fingu týdning av, at vit vóru saman um tær. Tíni góðu barnaminni eru líka góð fyri teg, sum minnini hjá onkrum øðrum eru fyri tey. Óansæð hvussu stór ella lítil tey eru, so eru tey tíni barna- og ungdómsminni. Vit kunnu flest øll hugsa aftur, og minnast onkra serliga løtu ella støðu, sum ger okkum heit um hjarta. Tí mugu vit sum foreldur gera okkara fyri at geva børnunum samveru, ið skapar teirra góðu minnir.

Seinastu árini hevur SSP ráðgevingin mint okkum á at savna saman góð minnir. SSP ráðgevingin arbeiðir dagliga úti á skúlum og frítíðarplássum, har tey saman við børnum og foreldrum, royna at tryggja okkara børnum ein tryggan og góðan uppvøkstur.

Men við „Savna góð minnir saman“ er SSP farðið út á gøturnar, á stevnur og á festivalar. Tó er hetta ikki so øðrvísi frá restini av arbeiðinum hjá SSP. Øll hava brúk fyri sínum søgum at trívast og minnast afturá, og at kunna siga: „minnist tú hinaferð...“

## Savna góð minnir saman

Børn og ung, ið merkja nærveru og umsorgan frá foreldrunum, bæði trívast og mennast betur. Familja og vinir eru hornasteinar í tilveruni hjá barninum og teimum ungu, og samvera við síni næstu skapar sosialar førleikar, ið hjálpa barninum at trívast

Átakið „Savna góð minnir saman“ verður gjørt fyri at minna okkum á, at hvør løta er ein gáva. Um týdningin av at njóta løturnar saman, til at skapa bond og upplivingar saman.

*Óli Rubeksen, SSP ráðgevi*

## Samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politi

# RIGGA NÆMINGARNAR



# TIL AT VELJA RÆTT Í FERÐSLUNI

## YVIRSKIPAÐ MÁL

**1. - 3. FLOKKUR**
Næmingurin dugir reglur og hugburð um at bera seg rætt at til gongu í ferðsluni, nýta hjálm, endurskin og bilbelti

**4. - 6. FLOKKUR**
Næmingurin lærir ástøðið at bera seg rætt at á súkklu og í myrkri í ferðsluni

**7. - 9. FLOKKUR**
Næmingurin fær ment sínar førleikar at taka trygg val í ferðsluni í mun til ferð, rúsdrekka, trygdarbelti og gáloysni

**RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD**

Hagtøl siga okkum, at tá ið tey ungu eru 15 ár standa tey á gáttini til tey 10 vandamestu árini í ferðsluni. Tað er her, at tey ungu eru yvirumboðað í ferðsluvanlukkum, bæði sum skadd og deyð.Tí mugu vit halda fast í nullhugsjónini um at eingin má doyggja ella fá álvarsligt mein í ferðsluni.

Tí ræður um at skipa dygga frálæru um ferðslu frá skúlabyrjan.

**Á www.snar.fo/ferdsla er nýtt og ókeypis talgilt undirvísingartilfar í ferðslu tøkt til øll floksstig at brúka**

**Foreldur skulu takast við**
Atferðin hjá foreldrum í ferðsluni hevur stóran týdning fyri, hvussu børnini bera seg at, og hvønn váða tey taka. Tí verða foreldrini tikin við í ferðslutilfarinum – í foreldrabrøvum, foreldrafundum og í filmi.

*Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til rff@rff.fo.*



# Øll hava rætt til GÓÐ BARNAÁR



"Eg fann útav, at tað eri ikki bara eg." (Drongur, 10 ár)

"At møta øðrum, sum eru í líknandi støðu, hevur gjørt, at eg ikki kenni meg so einsamalla meira, og eg skilji nú, at tað ikki er mín skyld, at mamma drekkur."
(Genta, 12 ár)

"Øll hava rætt til góð barnaár" er ein liður í fyribyrgjandi verkætlanini hjá Bláa Krossi Føroya, har vit bjóða børnum og ungum, ið hava foreldur við rústrupulleikum, í bólk saman við øðrum børnum, sum eru í líknandi støðu.

Hevur tú hug at koma í bólk, ella kennir tú onkran, sum kanska hevur hug, ella vilt tú vita meira, er tú vælkomin til at seta teg í samband við bólkaleiðararnar við senda ein teldupost til:

bolkar@blakross.fo

ella ringja á telefon:
770708 ella 770709

Ella vitja okkara síðu á Facebook,
Øll hava rætt til góð barnaár

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS


TÚ OG EG OG KVIKK
– hvussu hjálpa vit børnum at menna sosialar førleikar
FRÁLÆRUTILFAR TIL 0.-3. FLOKK
VØR ERT TÚ
OG HINI
Eisini ein dropi gjarðar útfrá
– tú kanst gera mun!

barna bati




# TÚ & EG

## Ráðgevingin

Barnabati arbeiðir fyri at hjálpa og bøta um kor, uppvøkstur og menning hjá børnum og ungum í Føroyum. Vit ynskja, at øll børn hava møguleika til persónliga menning, og at tey fáa tann stuðul og umsorgan, tey hava tørv á.

Tú & Eg Ráðgevingin er eitt ókeypis tilboð um anonyma hjálp. Óheft av átrúnaðarligum og politiskum hugburði veitir ráðgevingin neutrala og holla fakliga upplýsing, vegleiðing og ráðgeving til øll tey, sum seta seg í samband við hana umvegis telefon, kjatt, bræv ella SMS.



**BARNABATI**
**TÚ & EG RÁÐGEVINGIN**
Niels Finsensgøta 32 - 2.Hædd 100 Tórshavn +298 522011
barnabati@barnabati.fo www.barnabati.fo
www.facebook.com/barnabati

# WWW.BERIN.FO



BERIN
Sig tína søgu
At missa foreldur ella systkin er eitt tað ringasta, sum kann henda fyri eitt barn. Man verður so keddur,og sorgin verður so stór, at alt kennist meiningsleyst.
Fleiri av hesum børnum, møtast í bólkum, fyri at tosa saman. Tey siga, at tað kennist gott at tosa við onnur, sum hava roynt tað sama sum tey, og tí vita, hvat tey tosa um
Telefon 22 29 93

# FYRIBYRGJANDI ARBEIÐI OG SPÆLIBÓLKAR

# – HVAT KUNNU VIT GERA?

Fyribyrging er lyklaorðið í arbeiðinum við góðum sosialum trivnaði. Miðvíst arbeiði við trivnaðinum er eisini við til at forða fyri happing og órógv millum næmingarnar. Fyribyrgjandi arbeiði skal verða ein heilt náttúrligur partur av gerandisdegnum í skúlanum. Hetta ljóðar skilagott, men ofta er trupulleikin at finna rætta mátan. Lærarin órógvast ofta av, at arbeiði, sum ikki hevur við beinleiðis fakliga undirvísing at gera, tekur nógva tíð av undirvísingartíðini. Lærarin skal ígjøgnum eitt pensum og kann ofta kenna seg trýstan í mun til tíðina. Hetta kann vera ein orsøk til, at arbeiði við trivnaði hevur trupult við at gerast ein heilt náttúrligur partur av skúladegnum.



**SPÆLIBÓLKAR:**
Børnini ganga í flokki saman í nógv ár, og hóast tey eru saman øll hesi árini og allar skúladagarnar, er als ikki vist, at tey kenna hvønn annan serliga væl. Tey hava kanska eina mynd av hvørjum øðrum, sum í summum førum passar væl, og í øðrum førum er heilt av leið. Spælibólkar er eitt umhvørvi, har øll hava møguleika at verða sædd og hoyrd og koma til orðanna og er ein sera góður máti at arbeiða við trivnaði. Allir limirnir í bólkinum sleppa at vísa sítt virði í tryggum heimligum umhvørvi, ið foreldrini vara av. Samumtikið snýr tað seg um at styrkja sosiala kapitalin í einstaka flokkinum.

> Samumtikið snýr tað seg um at styrkja sosiala kapitalin í einstaka flokkinum



**SKIPANIN VIÐ SPÆLIBÓLKUNUM:**

1. Stuttur felags foreldrafundur, har flokslærarin kunnar um tiltakið og talar fyri skipanini við spælibólkum, við atliti til góðan trivna í flokkinum, sum er ein avgerandi fortreyt fyri góðum læriumhvørvi. Tað er sera týdningarmikið at fáa øll foreldrini við uppá tiltakið. Tí má tað lagast til, so at øll fáa verið við t.d. at skipa av koyring, hølisviðurskifti o.a. Flokslærarin skal tryggja sær, at boðskapurin er greiður og hugsjónin við vinarbólkum er skilt.
2. Flokslærarin bólkar næmingarnar eftir sosialu relatiónunum í skúlanum. Flokslærarin setir 4-5 næmingar, sum í skúlanum ikki sýnast at hava nógv við hvønn annan at gera, í sama bólk. Hetta kemur sjálvsagt at broytast eftir, at bólkarnir eru broyttir nakrar ferðir.
3. Yvirskipaðar reglur verða gjørdar fyri, hvat børnini gera, tá tey eru saman í spælibólki. T.d. er ein meginregla, at børnini skulu vera saman um gerandisting. T.v.s. tey skulu ikki í biograf, bowla o.líkn. Somuleiðis er elektroniskir miðlar, sjónvarp og telduspøl óheppið í samveruni. At bjóða børnunum at eta døgurða saman við vertunum, hevur verið sera væleydnað, men um foreldur halda hetta vera ov møtimikið, er tað ikki neyðugt.
4. Foreldrini at børnunum í ymsu bólkunum seta seg saman og finna tíðir/dagar fyri, nær spælibólkurin skal vera hjá hvørjum, og hetta er sera týdningarmikið at fáa gjørt, áðrenn tey fara heim.
5. Avtalað verður eisini, hvussu tey skipa heimavitjanirnar t.v.s. nær byrjar og endar vitjanin (2 tímar er væl hóskandi), hvussu við flutningi frá skúla/frítíðarskúla, skulu tey eta saman o.a.
6. Tá børnini verða heintað, skulu foreldrini geva sær stundir til ein drekkamunn, men ætlanin er ikki, at foreldrini skulu gera nakað hóvastók burturúr. Hóast foreldur hava yvirskot til heimabakstur o.a., so verður heldur mælt frá at gera tað, so tað ikki kennist sum eitt trýst fyri tey, ið ikki hava tíð og orku.
7. Í upplegginum vísir lærarin á stóra týdningin, at alt prát millum foreldrini er jaligt. Hetta er bæði galdandi, tá talan er um onnur foreldur í flokkinum, næmingar og lærarar.

# FYRIBYRGINGAR-MYNDIL

Danski stovnurin *Det Kriminal-præventive Råd* hevur ment ein fyribyrgingarmyndil, sum skal lýsa ta torgreiddu heild, ið má vera støðið undir royndunum at fyribyrgja kriminaliteti. Tað hevur verið ógvuliga ymiskt, hvussu fólk, ið virka á hesum øki, hava hugsað um kriminalitetsfyribyrging, alt eftir fakligum støði, arbeiðsuppgávu ella øðrum. Fyribyrgingarmyndilin er eitt boð á eitt felags fatanargrundarlag at samskifta út frá, tá ið fleiri aktørar við ymiskum fortreytum hittast og skifta orð um ætlanir og íverksetan av átøkum, sum hava til endamáls at fyribyrgja kriminaliteti.




„Fyribyrgingarmyndilin, ið er amboðið, at leggja til rættis átøkini í SSP."

**SOLEIÐIS VERÐUR MYNDILIN BRÚKTUR**

Myndilin kann gera tað lættari at fáa eina felags fatan sum støði undir teimum fakligu viðgerðunum, sum alla tíðina fara fram innan SSP. Eitt nú um, hvussu tey ymisku átøkini skulu raðfestast, hvør faklig umhugsan skal vera grundarlag undir einstøku átøkunum o.a.

Myndilin lýsir tørvin á at fáa tey trý stigini at hanga saman – tey uppbyggjandi átøkini skulu styðja upp undir tey fyribyrgjandi átøkini, sum síðani skulu styðja upp undir tey kriminalitetsfyribyrgjandi átøkini.

> ” Tað er sostatt ikki nóg mikið bara at gera átøk, sum eru kriminalitetsfyribyrgjandi, tí so verða vit ofta ov sein á sjóvarfallinum. “

**UPPBYGGING**

Hugtakið uppbygging merkir tey átøk, sum snúgva seg um:

> ” at skapa øllum í samfelagnum góð, trygg og mennandi kor. “

Henda breiða allýsing fevnir um tey átøk, sum styrkja bæði samfelagið og tann einstaka grundleggjandi. At hugtakið er niðast í myndlinum vísir, at tey uppbyggjandi átøkini eru grundarsteinarnir undir fyribyrgingararbeiðnum. Tað kunna vera politisk, umsitingarlig ella privat átøk, sum kunnu vera landsumfatandi ella lokal. Átøkini á uppbyggingarstiginum kunnu í størri ella minni mun hava kriminalitetsfyribyrgjandi árin, men grundgevingin fyri teimum er sjáldan tann, at tey eru kriminalitetsfyribyrgjandi. Grundgevingin fyri átøk á hesum stiginum er fyrst og fremst, at tey hava almennan týdning og eru gagnlig fyri øll.

**VANDAFAKTORAR OG VERNDARFAKTORAR**

Vandafaktorar og verndarfaktorar verða allýstir eitt sindur ymiskt alt eftir hvørjum sambandi tað er í. DKR tekur støðið í hesum báðum allýsingunum:

Ein vandafaktorur boðar frá øktum sannlíkindum fyri kriminaliteti seinni. Gransking ger mun á einstaklingafaktorum, familjufaktorum, umhvørvisfaktorum og bygnaðarfaktorum. Lág sjávsstýring er eitt dømi um einstaklingavandafaktor, meðan rúsmisnýtsla hjá foreldrunum er ein familjuvandafaktorur.

Ein verndarfaktorur boðar frá lítlum sannlíki fyri kriminaliteti seinni og tekur burtur ella minkar árinið av vandafaktorum. Eisini her ger granskingin mun á einstaklingafaktorum, familjufaktorum, umhvørvisfaktorum og bygnaðarfaktorum. At hava eina jaliga sjálvsfatan er dømi um ein einstaklingaverndarfaktor, og tað at hava jalig viðurskifti við foreldrini er eitt dømi um ein familjuverndarfaktorur.

**Allýsingin**
íblástur frá David P. Farrington,
„Saving children from a life of Crime“. 2007

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

Vitja okkum á

facebook

FØROYAPRENT I SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705